# ítróttur

Nr. 34 • hósdagur • 16. februar 2006 • 80. árgangur • www.sosialurin.fo

# Færri áskoðarar kostaðu FSF hall

**Áskoðarainntøkurnar vóru væl minni enn ætlað, og hetta er høvuðsorsøkin til, at ætlaða lítla yvirskotið hjá Fótbóltssambandinum gjørdist til eitt lítið undirskot í fjør**

FSF-ROKNSKAPUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eitt hall á 287 tkr. mótvegis einum yvirskoti á 2.539 tkr. í 2004. Tað er úrslitið á botnlinjuni í FSF-roknskapinum, sum verður lagdur fyri aðalfundin leygardagin.

Hetta skal sammetast mótvegis løgdu fíggjarætlanini, sum sýndi eitt yvirskot á 411 tkr.

Talan er tó ikki um nakra penganeyð í FSF hóast hallið. Eginpeningurin telur góðar 18 mió kr. av samlaðu ognini á 23,5 mió kr. Langfreistaða skuldin er bara 1.679 tkr., og verða avsetingar roknaðar frá, er talan heldur ikki um stórvegis stuttfreistaða skuld.




*Vandin fyri fíggjarligum skrædli av óhepnum lutakasti hvarv at kalla við nýggju sjónvarpsavtaluni. Men gamla avtalan vildi hinvegin givið munandi meira pening fyri fronsku heimsstjørnurnar*

**Áskoðararnir vóru færri**

Størsta einstaka orsøkin til frávikið var, at áskoðarainntøkurnar hjá FSF vóru væl minni enn tað, sum roknað varð við.

Í fjør vóru hesar 1.362 tkr., og tað er væl minni enn tær 2.033 tkr., sum streymaðu í kassan í 2004.

Í allar aðrar mátar tóktust inntøkur og útreiðslur at fylgja løgdu ætlanini hampuliga væl. Roknskapurin er tó eisini merktur av, at Fótbóltssambandið í ávísum førum hevur hugsað longur enn bara til árslok 2005. Eitt nú eru 480 tkr. útreiðslurførdar til MaFF-grunnin. Hetta er grunnurin, har feløgini kunnu søkja um stuðul til fyrisitingarlig endamál, nú tey krøvini eru munandi herd. Sama upphædd verður eisini avsett í 2006, soleiðis at samlaða stovnsfæið í grunninum verður úti við milliónina.

**Sjónvarpsavtalan kostar**

Tað man ikki vera sørt, at nevndin í FSF kann iðra seg nakað um, at tey fyri tveimum árum síðani gjørdu eina broytta avtalu við sports-five, sum umsitur sjónvarpsrættindini til føroyska fótbóltslandsliðið.

Útgjaldið eftir nýggju avtaluni er í nógv minni mun tengd at, hvørji mótstøðulið Føroyar fáa í lutakastinum til undankappingar. Orsøkin til, at FSF valdi hesa loysn, var sjálvandi, at vandin fyri fíggjarligari vanlukku í einum lutakasti tá verður mest sum elimineraður. Men hinvegin merkir tað eisini, at møguleikin at skora tann heilt stóra vinningin hvørvur.

Og tað kundu Føroyar gjørt í ríkiligt mát. Við seinastu undankapping var Frakland í okkara bólki. Og tað eru teir aftur hesaferð - enntá saman við Italia. Ein samanseting, sum helst vildi oyst pengar í FSF-kassan eftir gamla sáttmálanum, men altso ikki eftir tí nýggja.

Men útfallið av lutakasti ber sjálvandi illa til at spáa um. Og høvdu Føroyar kanska fingið tvær ferðir Kekkia heldur enn Frakland hesar báðar seinastu ferðirnar, vildu øll verið fegin um stabilitetin, sum nýggja avtalan inniber.

## 2. deild verður 1. deild

FSF ætlar sær nú at taka stigið við sponsor-heitum á kappingunum fult út.

Formula-deildin skal framhaldandi ber sponsorheiti. Men 2. deild skal nú broyta navn til 1. deild, meðan 3. deild verður 2. deild o.s.fr.

Hetta er ein gongd, sum hevur verið vanlig í øllum grannalondum okkara, og sum skilst, so var talan ikki um tað heilt stóru mótstøðuna, tá spurningurin var reistur á árliga heystarfundinum við feløgini.

**-mørk**

# Leiguavtalur skulu loyvast

**Síðani reglurgerð um sáttmálaleikarar kom í gildi í Føroyum, hevur ein av sokallaðu grásonunum verið, hvussu feløg skulu fyrihalda seg til leiguavtalur, men hetta verður nú broytt**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fleiri feløg hava gjørt leiguavtalur, men hesar hava fyrst og fremst bygt á innanhýsis avtalur og álit.

Sambært galdandi reglum, so merkir ein leiguavtalu í veruleikanum, at spæliloyvi verður avhendað. Og tað kann gerast óheppið, um felagið, sum lænir spælara, brádliga noktar at lata hendan aftur til móðurfelagið.

Hetta vil í øllum førum ikki vera í stríð við galdandi FSF-reglur, og tí vildi talan í slíkum føri verið um sivilt rættarmál, um móðirfelagið skuldi kravt spælaran aftur.

Hetta verður nú ætlandi broytt. Sambært broytingaruppskoti, sum verður lagt fyri aðalfundin hjá FSF leygardagin, nýtist møguligur leikarasáttmáli ikki at fara úr gildi, tá leiguavtala verður gjørd.

Treytin er tó, at avtalan millum feløgini ikki má stríða ímóti teimum reglum, sum longu eru galdandi. Og at leigusáttmálin skal góðkennast av sáttmálanevndini hjá FSF.

## Claus fekk eina løtu í sigri

Claus Bech Jørgensen spældi mikukvøld tað síðsta korterið, tá Coventry vann 2-1 á heimavølli ímóti Sheffield Wednesday.

Coventry hevur staðið seg væl á heimavølli í ár, og tann gongdin helt fram í kvøld, tá Sheffield Wednesday var á vitjan. Áleyparin Stern John legði Coventry framum beint fyri steðgin, og í 76. minutti skoraði Gary McSheffrey til 2-0 eftir fríspæling frá veteraninum Dennis Wise. Tríggjar minuttir seinni minkaði útiliðið til 2-1, men Coventry megnaði at halda fast um leiðsluna. Claus Bech Jørgensen varð settur á vøllin í 75. minutti. 20.021 fólk vóru til dystin á Ricoh Arena í Coventry í kvøld.

Coventry liggur nú á fjúrtanda plássi av teimum fýra og tjúgu liðunum í deildini.

**-stef**

## Tvey flyta beinleiðis niður

Fagnaðurin hjá Gøtumonnum var øgiligur, tá teir í seinastu sekundunum av seinasta dystinum í fjør megnaðu at lyfta seg upp um TB. Týdningarmikla málið bar við sær, at GÍ endaði næstniðast á stigatalvuni, og tí fingu teir ein eyka møguleika at halda sær í deildini. Ein møguleika, sum teir eisini tóku av við tryggum samanløgdum sigri á B71.

Men eftir nýggja lógaruppskotinum hjá FSF, so vildi málið hjá GÍ á Skála ikki havt annað enn kosmetiskan týdning. Skotið verður nevnliga upp, at nummar 9 og 10 í Formula-deildini flyta beinleiðis niður í fyrstu deild í 2006. Sama skipan verður eisini galdandi í deildunum niðureftir.

Hartil verður eisini staðfest, at tað bert eru tey bæði fremstu liðini í eini deild, sum kunnu flyta upp. Tað vil siga, at eigur t.d. vinnarin av fyrstu deild longu lið í Formula-deildini, verður tað bert eitt lið, sum flytur upp, og hevur nummar trý tí ikki sama møguleika, sum tey áður hava havt.

**-mørk**